**Vilmundskvæðið**

1.
Lurtið eftir kvæðinum , sum vakurt er at hoyra
Meðan eg kvøði um barðagar har svørini syngja I ðroyra.

Gar I dans frua , sprund eg fagurt kjos , dansa mær
Til handa so fagurliga sum tu kann, gar i dans frua.

2.
Jørmundur varð a navni nevndur kongur I Garðarrikið
Jørmundur eitur hans menskir sonur, summ fair
finnast slikir.

3.
Jørmundur eitir kongsins sonur raskur I øllum verki
Hann eigur sær ein stallbroður, teir nevna Vilmund sterki.

4.
Tað var siður I garðarrikið burtur a skog at ganga,
So for hvør I sin ætt tey villini djor at fanga.

5.
Tað var Jørmundur kongsins sonur burtur a skogin for
Vilmundur fylgdi aftana, baðir at veiða djor.

6.
Dimma myrkur og toka tjukk niður a landi drog,
Vilmundur og kongsinssonur teir viltust burtur a skog.

7.
Gingu teir I tjukkari toku, tað so ðrugvu leið ,
Leitaði vitt umm allan skog, men alt bar burtur av leið.

8.
Kongssonur longi vilstur var, aðrenn han vegin fann
Hitti uppa tað gøtuna sum heim at borgun rann.

9.
Hoyrir snakk og mannaskrol, vert er eftir at slota
Kongsins menn a borgun standa teir siggja ein skipaflota.

10.
Soðu ein storan skipaflota, efir havi liða,
hildu eftir gomlun vana, ofrið hava at tiða.

11.
Soðu ein storan skipaflota , seglini svørt sum ravn,
nu er at vænta orrustu teir løgdu I borgar havn.

12.
Sigldi I havn tann skipafloti, legði inn at stein
Blamen lupu a landi upp so ikki bleiv eftir ein.

13.
slogu sinar tjaldbuðir skamt fra sjovarstrond,
allir voru blamenn grummir komnir at taka lond.

14.
Buðust teir til bardagar alt fyriuttan sorg,
Tolv av svørtu blamonnum , riðu heim I borg.

15.
Riða snart og stundisliga at flyta harra orð,
Komu so I høllina inn ta kongurin sat yvir borð.

16.
Svaraði ein av blamunnum , tit haldi upp mat at skerða
Meðan eg mini ørðinði fra harra minum ma berða.

17.
Skjøldur skal tu nevna meg sum væl kann beita brandi,
Eg eri sendur av Buris kongi, reður for blaa landi.

18.
Hann hevur hoyrt a skamri stund at tu eigur dottir vana,
Eingin finnur I nøkrum landi vanari moy enn hana

19.
Hann torir ikki Buris kongur umm mina dottir at biða,
Heldur vil eg skipari verða enn gerða sum hinir siga.

20.
Vil tu ikki tina dottir senda okkum til handa,
Vit skulu hana av borgun takað og flyta niður til stranda.

21.
Hoyr tu Jørmundur kongurin tu stikk honum ongi skør,
Hann leggur eld I borgina og drepur teg vid svørð.

22.
Tu hevur ikki I øllum heimi nakaran menskari mann
Sum I einum einvyggji berjast kann við hann.

23.
Tað ðrivir bloð I heidna kongi tekur so hart at njosa,
Ovist er at gabba av hvør sigurin hevur at rosa

24.
Jørmundur eitur min menski son, hann ræður for systir goð,
Eg gevi ikki svar I dag ti hann er burtur a skog.

25.
Ei verður kappin Buris kongurat biða honum umm stund,
Hann setur eld a borgina og drepur teg summ ein hund.

26.
Ei verður hann at reisa til tin ein golga av træ og strikku
Hann tekur teg við baðum hongum og rivir til hals I stykkir.

27.
Burtur riðu sveinarnir sum voru av blamanna rikið,
Nu er kongssonur afturkomin hann hoyrir tiðindi sliki.

28.
Hoyrir tu Jøærmundur sonur min hvar er best at raa
Skulu vit bugvast til bardagar imoti teimun at slaa.

29.
Vit skulu bugvast til bardagar og ikki umm annað at røða
Fyrsti tattur uti er men nogv er eftir at kvøða.

30.
Tattur ein at enda er men kvæðið varar longur
Nu skal eg takað upp annan tatt og viti hvussu gongur.

31.
Jørmundur læt sær liði samla saman a nattartið,
Aðrenn dagur at lysa tok var hann bugvin til strið.

32.
Buris vaknar I sinum tjøldum aðrenn tað lysir bjart,
Ropar hann a sin ransmannahop, biður teir standa upp snart.

33.
Brutu ut ur tjøldunum teir bitu I stal við tonnum,
Berserkar og kolbitar at berjast mot borgarmannum.

34.
Jørmundur førdi borgarher ei mundu blamenn biða
Møttust a eini slettari markteir brustu saman at striða.

35.
Tað var Jørmundur kongsinsson, hann rendi I striði framm
Ruddi sær eina breiða gøtu, framm at merkismann.

36.
Eingin toldi hansara høgg, men allir fullu a fløtu,
Reið so djupt I herin framm, hann ruddi breiða gøtu.

37.
Skjøldur var tan berserkur blamannamerki hevði,
Rendi imoti Jørmudi og spjoti till hann legði

38.
Hann stakk til við dyggum spjoti, ilt var fyri at verða,
Kongsonur sprakk I lofti upp sum hann var vanur at gerða.

39.
Spjoti stoð I jørðini fast, hin dvøldist nakað ta,
Jørmundur høgg við baðum hondum, ta hann hetta sa.

40.
Høggi kom umm tvørar herðar, geislar skiltust fra.
Ta fall Skjøldur berserkur hann deyður at vølli la.

41.
ta fall Skjøldur berserkur, hann deyður a vølli la,
slikt mundi siggja Buris kongur sum nær var staddur hja.

42.
Rendi hann motI Jørmundi hann ætlar hans høvur at klugva,
Høggur niður I gyltan hjelm, storir neistar flugva

43.
Neistar flugu summ smiðjueldur mikið var sus og skral,
Login festi næsta skog, tað birtist so bjart eitt bal.

44.
hoyrast mundi langan veg, vapnar brakan og skral,
kongssonur hann finnir ta at ikki bitir a stal.

45.
Jørmundur sinum svøri bra, hann brukar styrki alla,
Høggi kom a Buris kong og niður a beran skalla.

46.
Høggi kom a beran skalla, gleið summ eftir lunni,
Loysti nøs og kjalkabein so tennir ruku ur munni.

47.
Kongssonur var ta møddur I strið, av sarinum hann hevði fingið
Segnaði niður a grønan vøll hann la I oviti longi.

48.
Ta kom fall a Borgarher, blamenn hildu skral,
Trokaði framm vi bunum brandi teir boru at borgum bal.

49.
Vilmundur var a skognum vilstur, nu er hann komin at høllum
Frettir hann fra blamonnum og teirra verkum øllum.

50.
Vilmundur nu at frætta fekk at striðið stoð fyri borg,
Kongssonur var niðurfeldur og folk flutt av sorg.

51.
Ta ið hann fekk tey tiðindur ta ornaði hansara bloð,
Skundar sær við miklari vreiði at klaðast I herklæði goð.

52.
Vilmundur tekur ein tjukkan hjelm setir a beran skalla
Fyra folðaða ringbrynju slikt kann mann kempur kallað.

53.
Tað var Vilmundur kempan sterk heitt var hansara bloð,
Skundar hann sær til baradaga og har summ striðið stoð.

54.
Herviligur hann trokaði framm bæði við svør og spjot,
Eggjaði teimun summ undan runnu til aftur at halda imoti.

55.
Vilmundur rendi I herin framm hann hjo so brynjur stukku
Blamenn fella fyri hans fot teir undan honum fuku.

56.
Vilmundur rendi I herin framm slikt mundi Buris siggja,
Blamenn fellafyri hans fot summ grasið fellur fra liggja.

57.
Rendi hann ta moti Vilmundi sum vendi honum imoti
Sipaði hvør til annan fast bæði við svøri og spjoti.

58.
Høgga titt teir liva lit av bar barnagaman
Eldur reyk av svørunum ta eggjar brustu saman.

59.
Buris kongur svøri bra hann moti Vilmundi sloð
Høggi kom I andliti so ut dreiv mikið bloð.

60.
Ta ið Vilmundur sviðan fekk bra honum við so hart
Trivir hann eftir Buris kongi við so miklari makt.

61.
hann trivir eftir Buris kongi við so miklari skund
svørðið stakk ur hondum leyst tað fleyg so langt I lund.

62.
Svørið feyk so langan veg fleyg ur hondum leyst
Trivir eftir øksini hann hevði við suiðu fest.

63.
Vilmundur reiggjar øksina av so goðum treysti
So slog hann til buris kong at stali stakk fra brosti.

64.
Ikki beit a bringubeini umm tað merkti skinn
Kongurin gav so stort eitt skral tað hoyrdist uti og inni.

65.
Ta ið  Buris sviðan fekk hann gav so stort eitt skral
Vilmundur høgg við baðum hondum ta helt ikki stal.

66.
Tungt var slag av øksahamri ei mundi megin feila
Hjalmur sprakk av Buris kongi hamarin stoð I heila.

67.
Ta ið hann hevði niðurfelt buris kong til valla
Rendi hann mati blamonnum hann rak teir burtur allar.

68.
toku gos og herklæðir summ vitt umm vøllin lag
toku gull og hjalmar og brynjur so ikki feks tølir a.

69.
Toku gull og hjalmar og brynjur so ikki fekst tølir a
Komu framm til kongssonin teir sou hvar hann lag.

70.
ta ið teir livsmakt við konum kendi lætnaði hjartasorg
skutu undir hann skjøldrarnar, boru hann heim I borg.

71.
Breiddi undir hann breiðasilki boru hann heim I borg
Tak við sæla systir goð og grøð dygga drong.

72.
Grøddi hon hann um dagar grøddi hon hann I tra
Sætta dag I sjeyndu viku hann for I brynju bla.

73.
sætta dag I sjeyndu viku for hann I brynju niggja
so varð hann leiddur I høllina inn so vanur garpur at siggja.

74.
Jørmundur og Vilmundur teir raa for Garðarikið
So var ongin I verðini summ ta var teirra likið.